# Marknaðurin he

– Tað hevur ongantíð verið so stórur tørvur á politikki á altjóða stigi sum nú. Vit missa hvønn dag sjálvræði til óreguleraðu marknaðarkreftirnar, og seinastu mongu árini hava stórfyritøkurnar fingið frítt spæl. Einasti møguleiki hjá okkum at endurvinna sjálvræði, er at nýta okkara royndir frá nationala statinum og yvirføra tær á altjóða stig, sigur Poul Nyrup Rasmussen, sum nú er formaður fyri javnaðartingfólkini í Evropatinginum

NÝGGJ AVBJÓÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Brússel:** – Ja, men du går bare over til blok G, tager elevatoren op på 11. etage og i lokale nummer 130 finder du os.

Tað er eftir øllum at døma ikki bara at siga tað at finna á bonaðu gólvunum í Evropatinginum. Staðsansurin hevur ongantíð verið sterkasta vápnið, og eftir hava gingið í stórfingna glasbygninginum eina løtu er tolið uppi. Eg ringi fyri at fáa hjálp at finna mannin, sum er orsøkin til mína bonaðu útferð í hjartanum av Evropasamveldinum.

Á steingólvinum trýtur ikki við álvarsomum andlitsbráum frá uppsnákaðum slipsamonnum við snotiligu dokumentmappum undir arminum. Her sæst einki til grønar búllajakkar, slitnar kovboybuksur ella piercingar. Nei, her eru øll í fínasta pussi – bæði kvinnur og menn. Nossligt og yndisligt.

– Så færingen er kommet? Jeg har desværre et møde om 17 minutter, så du får desværre ikke mere end 17 minutter, sigur hann – tann upptikni maðurin, ið heldur til á lon G, 11. hædd og í høli 130.

Hann er fyrrverandi danski forsætisráðharran, Poul Nyrup Rasmussen, sum í fjørsummar skifti Keypmannahavn og Christiansborg út við Evropatingið og Brússel.

### Størri samskipan

13. juni 2004 fór 61 ára gamli Poul Nyrup Rasmussen undir ein nýggjan part í politisku søgu síni. Við meira enn 400.000 persónligum atkvøðum gjørdist hann stóri atkvøðuslúkurin, tá danir í fjør summar settu kross við, hvørji 14 umboð skuldu umboða Danmark í Evropatinginum.

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin er eftir øllum at døma framvegis høgt í metum sum politikari, tí tá bólkurin fyri Evropeiskar Javnaðarlimir í Evropatinginum skuldi skipa seg, varð heitt á Poul Nyrup Rasmussen at standa odda fyri bólkinum, og hann var skjótur at taka formansuppgávuna á seg.

Frálíka valúrslitið og formanssessurin gjørdist ein verulig uppreisn fyri Poul Nyrup Rasmussen, sum valdi at fara frá sum formaður fyri Danska Javnaðarflokkin í úrtíð.

*Hvat hevur tikið teg mest á bóli við broytingini frá at vera fólkatingslimur til tinglim í Evropatinginum?*

– Satt at siga er tað, hvussu skjótt alt hevur gingið. Tað er ómetaliga spennandi at sleppa at royna seg í einum nýggjum politiskum umhvørvi. Eg eri blivin floksformaður enn einaferð, men hesaferð í einum evropeiskum og globalum rúmi, og tað er ótrúliga spennandi og ikki minst læruríkt. Eg læri eina rúgvu, tí hóast fleiri av trupulleikunum eru teir somu sum í Danmark, so verða teir viðgjørdir í nýggjum hami her niðri, svarar hann.

Í bólkinum hjá Javnaðartinglimunum eru í alt 32 ymiskir flokkar úr í teimum 25 limalondunum umboðaðir. Spurdur, hvør høvuðsmunurin er at samskipa ein bólk við í alt 32 ymiskum flokkum og ein fólkatingsbólk, svarar Poul Nyrup Rasmussen:

– Tann stóri munurin er, at í Brússel eru nógv fleiri sjónarmið, sum skulu samansjóðast, og tað fer við nógvari tíð og arbeiði. Ein annar høvuðsmunur er, at í Brússel verður ikki farið niður í smálutirnar í teimum ymisku málinum, men hinvegin verða málini viðgjørd meira yvirskipað.

Í Evropatinginum sita 732 tinglimir. Tinglimirnir sita ikki saman eftir tjóðskapi, men hinvegin eftir politiskari sannføring. Hetta hevur við sær, at eitt nú Javnaðarmenn ella teir Liberalu eru flokkaðir saman, uttan mun hvønn tjóðskap, teir hava.

Kristiligu Demokratarnir hava flestar tinglimir í Evropatinginum, meðan bólkurin hjá bólkurin hjá javnaðartinglimunum er næst størstur. Teir 732 tinglimirnar eru býttir í átta tingbólkar.

### Á slóðina

Fólk eru rættiliga vanliga ójøvn á máli, hvussu Poul Nyrup Rasmussen stóð seg sum forsætisráðharra í Danmark frá 1993 til 2001. Á persónliga økinum fekk hann mangan ivasama skoðsmálið at vera ein stirvin, klombrutur teknokratur, sum ongantíð veruliga megnaði at vinna samkensluna hjá vanliga dananum.

Hansara leiklutur undir serliga bankamálinum og undir fullveldissamráðingunum hevur eisini havt við sær, at Poul Nyrup Rasmussen neyvan fer í søguna sum best lýddi forsætisráðharrin í Føroyum. Kortini stóð fyrrverandi formaðurin hjá Javnaðarflokkinum fyri fleiri politiskum frambrotum, tá hann stóð á odda fyri danska samfelagnum.

Serliga standa umfatandi ábøturnar á danska arbeiðsmarknaðinum eftir. Tá Poul Nyrup Rasmussen og Javnaðarflokkurin tóku við stjórnarvaldinum í 1993 valdaði stórt arbeiðsloysi í Danmark. Greipan Nyrup Rasmussen og fíggjarmálaráðharrin Mogens Lykketoft fóru gjøgnum heilt og settu fleiri nýggjar ætlanir úti kortið fyri danska arbeiðsmarknaðin. Úrslitini av átøkunum vóru góð, og millum annað eydnaðist at fáa í alt 200.000 fleiri fólk í arbeiði.

Fyrrverandi forsætisráðharrin vendir nú aftur á slóðina.

Sambært Poul Nyrup Rasmussen er fremsta uppgávan hjá ES í løtuni at loysa tær stóru avbjóðingar, ið standa fyri framman á arbeiðsmarknaðarøkinum.

– Vit hava í dag eitt arbeiðsloysi á 9% í Evropa, og tað er ómetaliga høgt. Millum annað hava vit í løtuni 5 mió. arbeiðsleysar familjur í Týsklandi, og tí er okkara fremsta uppgáva at skapa "more and better jobs", fortelur Poul Nyrup Rasmussen.

Hann vísir á, at tað er av alstórum týdningi, at ES-limalondini komandi árini endurskoða arbeiðsmarknaðarpolitikkin, so evropeiski arbeiðsmarknaðurin fær lagað seg til herdu krøvini, sum økta altjóðagerðin hevur havt við sær.

Sammett við undanfarin ættarlið kunnu løntakarar í dag ikki vænta at arbeiða á sama arbeiðsplássi, til teir fara frá við eftirløn. Gongdin er hinvegin, at vit á arbeiðsmarknaðinum skifta arbeiðspláss fleiri ferðir í lívsskeiðnum. Fremstu orsøkirnar til hesa broyting eru, at fyritøkur í dag áhaldandi flyta seg, bæði landafrøðiliga og ikki minst, tá ræður um framleiðslu, og hetta setur nýggj krøv til arbeiðsmegina.

Meðan loyalitetur áður var gandaorðið, eitur gandaorðið á arbeiðsmarknaðinum í dagsins samfelag fleksibilitetur.

– Okkara besta svar til nýggju krøvini, ið altjóðagerðin setir okkum, er at betra okkara evni til at skifta arbeiði. Vit skulu snøgt sagt stevna miðvíst eftir at gera tann evropeiska arbeiðsmarknaðin til tann mest mobila í heiminum, greiðir Poul Nyrup Rasmussen frá.

Flestu ES-limalondini hava í dag arbeiðsmarknaðarskipanir, ið



*-Tann stóri munuri*
*sum skulu samansj*
*Ein annar høvuðsm*
*í smálutirnar í teim*
*málini viðgjørd mei*
*um broytingina frá*
*Evropatinginum*